# Leys størv í Tórshavnar kommunu



## Býarbókavørður

Søkt verður eftir leiðara til Býarbókasavnið.

**Býarbókasavnið**
Tórshavnar kommuna setti Býarbókasavnið á stovn 1. apríl 1969. Býarbókasavnið er eitt nýmótans bókasavn við trimum deildum: Barnabókasavni, útláni fyri vaksin og lesistovu. Á bókasavninum eru 11 ársverk, og starvsfólkini eru 14 í tali. Bókasavnið eigur umleið 72.000 bøkur og filmar.

Í Tórshavnar kommunu eru 11 skúlabókasøvn og Kollafjarðar bygdar- og skúlabókasavn, sum øll samstarva við býarbókasavnið.

Býarbókasavnið er opið seks dagar um vikuna, og í 2008 var talið av vitjandi 76.626. Ætlanin er í næstum at broyta hølini hjá býarbókasavninum, soleiðis at ein partur av bókasavninum verður í veghædd, og verður hetta eisini ein avbjóðing hjá nýggja leiðaranum at skipa fyri.

Meira fæst at vita um býarbókasavnið á heimasíðuni www.bbs.fo.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv við fjølbroyttum og mennandi uppgávum og avbjóðingum.
Nakrar av høvuðsuppgávunum eru:
- at standa fyri og hava ábyrgd av dagliga virkseminum á býarbókasavninum, bæði mótvegis starvsfólkum og viðskiftafólkum
- at tryggja eitt tíðarhóskandi, mennandi og dygdargott umhvørvi
- at fylgja við og kunna seg um menning á økinum

**Førleikakrøv**
- Bókavarðarútbúgving
- Royndir í bókasavnsarbeiði
- Royndir í leiðslu og samstarvi
- Góður teldukunnleiki og áhugi fyri kunningartøkni
- Góður kunnleiki í føroyskum í skrift og talu

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, er fyrikomandi, dugir væl at samskifta bæði innan- og uttanhýsis og kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar. Neyðugt er at hava hugsjónir um virksemið á bókasavninum og kunna ganga á odda.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er eitt fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið, í 8. lønarflokki.

Býarbókavørðurin hevur tilvísing til mentamálaleiðaran.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jákup Simonsen, mentamálaleiðara, ella Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra, á telefon 30 20 10.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera hjá Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 21. september 2009.

## Búskaparfrøðingur

Tórshavnar kommuna søkir eftir búskaparfrøðingi til spennandi starv á fíggjardeildini.

**Uppgávur**
Sum búskaparfrøðingur ráðgevur tú fíggjarnevndini, stjórnini, stovns- og deildarleiðarum í búskapar- og fíggjarspurningum. Tú er við til uppseting av fíggjarætlanum, roknskapum og ávegis uppgerðum. Eisini ert tú við til at menna búskaparligu stýringina, umframt at loysa størri og minni verkætlanir.

Tórshavnar kommuna bjóðar tær eitt starv í einum spennandi og dynamiskum umhvørvi, við sjálvstøðugum uppgávum, ið geva tær góðar møguleikar fyri fakligari og persónligar menning.

**Setanin**
Vit rokna við at tú hevur viðkomandi búskaparliga útbúgving sum t.d. HA, HD ella Cand. Merc. og dugir at samskifta á føroyskum bæði í skrift og talu.

At tú hevur analytisk evnir, góð samstarvsevnir og eitt jaligt sinnalag.

Starvið verður lønt eftir útbúgving og royndum sambært sáttmálanum við avvarðandi yrkisfelag. Møguleiki er fyri ráðgevaraløn, um førleiki og royndir eru til tess.

**Upplýsingar um starvið**
Fleiri upplýsingar fært tú við at ringja til Hera Olsen, fíggjarleiðara, ella Janus Isfeldt, deildarleiðara, á telefon 30 20 10.

**Umsóknarfreist**
Umsókn við viðmælum og prógvum skal sendast til Tórshavnar kommunu, postboks 32, 100 Tórshavn, og vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. september 2009.

## Pedagogur til Býlingshúsið Inni á Gøtu

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja 1. september 2009 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Býlingshúsinum Inni á Gøtu, Ovaragøta 30 B, 188 Hoyvík, í seinasta lagi fríggjadagin 28. august 2009.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Poulu Ejdesgaard, stovnsleiðara, telefon 31 77 01.

Tórshavnar kommuna


EYSTUROYAR BETONG
- grundir
- trappur
- dekk
- garðar
- múrar
- tún
o.a. betongarbeiði væl úr hondum greitt fyri kappingarførar prísir. Tilboð verða givin
TELEFON 56 20 70 / 56 20 71

HJ Byggivirki
Orkusparandi heildarloysnir
Sethús • Tvíhús • Íbúðir
Skjótt, gott og bíligt – sjálvandi
Lyklaklárar loysnir
Tlf. 56 20 70 · Fax 44 78 90
T-postur: janj@post.olivant.fo

Nýggjar TANNPROTESUR
Broytingar og umvælingar av gomlum protesum
Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð
Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12
Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

Sosialurin -har tað hendir